KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 24.03.2022 kl. 17:30
Málnr.: 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Rógvi Jacobsen, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
26/22	22/00243-8	Broyting av almenna byggisamtyktartekstinum fyri Klaksvíkar kommunu
27/22	22/00231-10	Regulering av almennu byggisamtyktini - grundøkjavídd og parkering
28/22	22/00550-1	Broyting av byggisamtykt – nýtt D-øki millum Hjalla/undir Grashjalla
29/22	22/00445-1	Spillivatnsarbeiði í kommununi
30/22	22/00438-1	Raðfesting av játtan til fastognir 2022
31/22	21/02151-13	Vegir, Íløgur, 2022 - Regulering av "Garðabrekkuni"
Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum		
32/22	22/00549-2	Jústabrekka 1 – søla av ognini

Til viðgerðar

26/22
22/00243-8 Broyting av almenna byggisamtyktartekstinum fyri Klaksvíkar kommunu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	14.03.2022	19/22
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.03.2022	31/22
3 Tekniska Nevnd	15.03.2022	19/22
4 Klaksvíkar Býráð	24.03.2022	26/22

22/00243-8 Broyting av almenna byggisamtyktartekstinum fyri Klaksvíkar kommunu

Frágreiðing um málið:
Í samband við dagføring av okkara almenna byggisamtyktarteksti verður málið lagt fyri av nýggjum við tí dagførda tekstinum. Hetta fyri at nýta ta almennu føroysku bygningkunngerðina (BK17), tó við okkara undantøkum, ið eru í almenna byggisamtyktartekstinum, sum til dømis byggilinja til mark, byggilinja til veg, serligar ásetingar um bygging av bilhúsi inn í lendið og at nýta norskar normar til bygging av bilhúsi fram við vegi.

Tilmæli:
Mælt verður til at taka undir við dagføringini og leggja broytingina til almenna hoyring.

Ferðslunevndin 14. mars 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-03-2022.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. mars 2022:
Nevndin tekur undir við FeN 14-03-2022.

Tekniska Nevnd 15. mars 2022:
Nevndin tekur undir við UBN 14-05-2022.

Klaksvíkar Býráð 24. mars 2022:
Tilmælið frá TN 15-03-2022 einmælt samtykt.

27/22
22/00231-10 Regulering av almennu byggisamtyktini - grundøkjavídd og parkering

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	14.03.2022	20/22
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.03.2022	32/22
3 Mentanarnevndin	15.03.2022	15/22
4 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	15.03.2022	19/22
5 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	15.03.2022	11/22
6 Tekniska Nevnd	15.03.2022	20/22
7 Havna- og Vinnunevndin	16.03.2022	16/22
8 Klaksvíkar Býráð	24.03.2022	27/22

22/00231-10 Regulering av almennu byggisamtyktini – Grundøkjavídd og parkering

Frágreiðing um málið:
Tekniska fyrisiting leggur fram uppskot um at broyta ásetingina fyri grundøkjavídd fyri nakrar A økispartar í kommununi og at avloysa verandi krøv um parkering fyri nøkur A, B, C og E økir í kommununi.

Grundøkjavídd:
Meginparturin av ásetingunum ljóða soleiðis:
*Grundøkjavídd (í minsta lagi): 300 m^2 fyri vanlig sethús og **200 m^2** fyri samanbygd hús og íbúðir.*

Uppskotið hjá fyrisitingini ljóðar soleiðis, at:
*Grundøkjavídd (í minsta lagi): 300 m² fyri vanlig sethús og **150 m²** fyri samanbygd hús **og íbúðir**.*

Í summum førum hevur kommunan longu gjørt hesa regulering, nevnast kunnu økispartar A1 og A18.
Her hevur mann minkað um kravið til samanbygd hús og íbúðir niður í 150 m². Somuleiðis er orðingin "*og íbúðir*" løgd aftrat, hon er ikki staðfest í øllum økispørtum.
Henda regulering hevur víst seg at eydnast væl og vera tíðarhóskandi, tí tað letur upp fyri fleiri møguleikum viðv. íbúðabygging.

Parkering:
Fyrisitingin leggur upp til at strika verandi tekst undir parkering í nøkrum økispørtum í A, B, C og E og ístaðin vísa til eina og hvørja tíð galdandi bygningskunngerð.
Hendan broyting er meira tíðarhóskandi og letur upp fyri einum meira fjølbroyttum úrvali av parkeringsloysnum, bæði fyri borgaran og málsviðgerð.
Økispartar, ið ikki eru umfataðir av hesi broyting, eru A32 og E1, tí í hesum økispørtum verður víst til almenna parkering.

Í øllum A økispørtum verður víst til hesa orðing: *Á hvørjum grundøki skal kunna ávísast pláss til bilhús.*
Henda orðing verður broytt til at ljóða soleiðis: *Í samband við sethúsabygging skal kunna ávísast pláss til bilhús.*
Tað er meira viðkomandi at vísa til hetta krav í samband við sethúsbygging. Mett er ikki, at hetta er eitt eins viðkomandi krav til íbúðabygging.
Tá ið byggiloyvir til íbúðabygging verða viðgjørd og givin í dag, so verður kravið um bilhús ikki tikið upp til viðgerð, í staðin er fokus á parkeringsloysnunum.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Fyrisitingin mælir nevndini til at taka undir við uppskotunum um lækkan av grundøkjavídd niður í 150 m² fyri samanbygd hús og íbúðir í A økispørtum, og krøv um parkering sambært bygningskunngerðini í A, B, C og E økispørtum (uttan A32 og E1), og orðingin um bilhús verður broytt til einans at galda fyri sethús.

Ferðslunevndin 14. mars 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-03-2022.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. mars 2022:
Nevndin tekur undir við FeN 14-03-2022.

Mentanarnevndin 15. mars 2022:
Nevdin tekur undir við UBN 14-03-2022.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 15. mars 2022:
Nevndin tekur undir við MeN, dagfest 15. mars 2022.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 15. mars 2022:
Nevndin tekur undir við TrN B&U, dagfest 15. mars 2022.

Tekniska Nevnd 15. mars 2022:
Nevndin tekur undir við E&B 15-03-2022.

Havna- og Vinnunevndin 16. mars 2022:
Nevndin tekur undir við TN, dagf. 15-03-2022.

Klaksvíkar Býráð 24. mars 2022:
Tilmælið frá HaVN 16-03-2022 einmælt samtykt.

28/22
22/00550-1 Broyting av byggisamtykt – Nýtt D-øki millum Hjalla/undir Grashjalla

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Heilsunevndin	14.03.2022	K-4/22
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.03.2022	34/22
3 Klaksvíkar Býráð	24.03.2022	28/22

22/00550-1 Broyting av byggisamtykt – Nýtt D-øki millum Hjalla/undir Grashjalla

Frágreiðing um málið:
Í samband við at matr.nr. 1006bd aftur gerst kommunalt, verður uppskot um broyting av byggisamtykt lagt fram. Lagt verður upp til, at 1006bd verður tikið av sølulistanum, og eitt nýtt samanhangandi grønt øki verður útlagt í norðaru helvt av útstykkingini millum Hjalla.

Eitt stórt samanhangandi grønt øki er upplagt til uppihald, gøtusamband og parkering, sum allur býlingurin kann fáa ágóða av.

Frammanundan er matr.nr. 1006a (undir Grashjalla) tikið av sølulistanum, tí hetta grøna økið er serstakliga vakurt, við áarløki og flottum grønum vølli.
Nevnast kann, at í 2020 varð eitt annað fríøki (D41) útlagt fyri býlingin millum Hjalla.

Uppskot til nýtt D-øki millum Hjalla

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Mist inntøka á kr. 176.700,-
Sjey grundøkir eru tøk Millum Hjalla.

Tilmæli:
Fyrisitingin mælir nevnd og býráði til at taka matr.nr. 1006bd av sølulistanum og loyva fyrisitingini at arbeiða víðari við broyting av byggisamtyktini í mun til nýtt D-øki (fríøki).

Heilsunevndin 14. mars 2022:
Málið verið til kunning.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. mars 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-03-2022.

Klaksvíkar Býráð 24. mars 2022:
Tilmælið frá UBN 14-03-2022 einmælt samtykt.

29/22
22/00445-1 Spillivatnsarbeiði í kommununi

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Heilsunevndin	14.03.2022	K-3/22
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.03.2022	40/22
3 Tekniska Nevnd	15.03.2022	K-10/22
4 Fíggjarnevndin	22.03.2022	21/22
5 Klaksvíkar Býráð	24.03.2022	29/22

22/00445-1 Viðvíkjandi: Spillivatnsarbeiði í kommununi

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan hevur sent skriv, har Klaksvíkar kommuna verður biðin um at koma við einari frágreiðing um, hvussu langt áleiðis kommunan er komin við spillivatnsarbeiðinum. Viðheft er skrivið frá Umhvørvisstovuni. Umhvørvisstovan skal hava svar innan 1. februar 2022.

Í hesum sambandi kann fyrisitingin uppýsa, at kommunan hevur eina spillivatnsætlan, sum tekniskt er góðkend av Umhvørvisstovuni, men tá tíðarætlanin ikki er góðtikin, so er kommunan ikki millum tær kommunurnar, sum hava eina góðkenda spillivatnsætlan, og sum eru lidnar við sítt spillivatnsarbeiði.

Í seinasta skrivinum til Umhvørvisstovuna hevur kommunan upplýst, at komið verður á mál við spillivatnsarbeiðinum í 2024. Ætlanin heldur ikki, tí avsetingin á fíggjarætlanini til spillivatnsarbeiði fyri undanfarin ár og í 2022 hevur ikki svarað til ætlan kommununnar. Býráðið hevur á hendan hátt valt at útseta spillivatnsarbeiðið.

Í 2010 varð samlaða spillivatnsarbeiðið mett at kosta 85,0 mió. kr., og seinni er samlaði kostnaðurin mettur til einar 100,0 mió. kr.
Tilsamans hevur kommunan síðani 2011 brúkt 60,0 mió. kr. til samtykta spillivatnsarbeiðið. Nú verður mett, at 60,0 mió. kr. skulu brúkast afturat, fyri at koma á mál. Hetta merkir, at samlaði kostnaðurin verður einar 120,0 mió. kr.

Viðmerkjast skal tó, at kommunan í omanfyri nevnda tíðarskeiði hevur framt fleiri stórar og smærri verkætlanir, har spillivatn hevur verið partur av verkætlanunum. Hesin kostnaðurin er ikki í omanfyri nevndu tølum, tí nevndu verkætlanir eru ikki partur av spillivatnsarbeiðinum. Í spillivatnsætlanini eru bert tey gomlu økini, sum hava ónøktandi kloakkviðurskifti, og nýggjari økir, har kloakkin skal førast út á streymasjógv.

Tekniska fyrisiting hevur gjørt uppskot til svar til flestu spurningarnar frá Umhvørvisstovuni, spurningar sum fyrisitingin fær svarað uppá, men eftir eru tveir spurningar, sum krevja viðgerð í viðkomandi nevndum og býráði. Sí annars viðhefta uppskot til svarskriv.

Spurningarnir at greiða eru hesir:
1. Hvussu nógv er sett av til spillivatnsarbeiðið komandi árini.
2. Frágreiðing og dagførd tíðar- og fíggjarætlan fyri manglandi spillivatnsarbeiði.

Viðv. sp. 1: Kommunan kann upplýsa, at 3 mió. kr. eru settar av í 2022, men ikki hvussu nógv verður sett av komandi árini.

Viðv. sp. 2: Tá býráðið hevur viðgjørt spurningin um møguliga avseting komandi árini, kann svar gevast Umhvørvisstovuni uppá hendan spurningin út frá arbeiðsætlanini, sum er partur av spillivatnsætlanini.

Lógargrundarlag:
Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn.

Fíggjarligar avleiðingar:
Mett er, at tilsamans 60,0 mió. kr. skulu setast av til írestandi spillivatnsarbeiðið hjá kommununi. Metingin er gjørd út frá metta kostnaðinum í 2010 + regulering fyri ókent og prístalsregulering.

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting fer við hesum at mæla til, at minst 8,5 mió. kr. verða settar av til spillivatnsarbeiðið at byrja í 2023 og síðani tey fylgjandi árini til og við árið 2029, tá komið verður á mál.

Heilsunevndin 14. mars 2022:
Nevndin heitir á umsitingina um at fremja teir partarnar av spillivatnsætlanini, sum eru í og kring miðbýin, har nógv fólk savnast dagliga. Umráðandi er, at sentralar áir, eitt nú Ósáin, gerast reinar.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. mars 2022:
Ein meiriluti, GvK, OáL, RJ og SVJ, mælir til, at 5 mió.kr. verða settar av um árið til at fremja spillivatnsætlanina. JS tekur støðu í býráðnum.

Tekniska Nevnd 15. mars 2022:
Málið verið til kunningar.

Fíggjarnevndin 22. mars 2022:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ, OáL og TJL, tekur undir við meirilutanum í UBN 14-03-2022. JS tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 24. mars 2022:
Atkvøtt varð um tilmælið frá HeiN 14-03-2022 og meirilutatilmælini frá UBN 14-03-2022 og FíN 22-03-2022; tey vórðu samtykt við 10 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, RJ, TJL, SVJ og ÓML) og ongari atkvøðu ímóti. JS atkvøddi ikki.

30/22
22/00438-1 Raðfesting av játtan til fastognir 2022

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.03.2022	38/22
2 Fíggjarnevndin	22.03.2022	20/22
3 Klaksvíkar Býráð	24.03.2022	30/22

22/00438-1 Raðfesting av játtan til fastognir 2022

Frágreiðing um málið:
Umsitingin greiðir í skrivi, dagfest 21. februar 2022, nærri frá málinum.

Játtanin fyri fíggjarárið 2022 til fastognir er 2,0 mió. kr., og hevur UBN árini frammanundan raðfest játtanina til ymiskar átrokandi verkætlanir.

Um nóg mikið av peningi var tøkur, hevði uppskotið til raðfesting í 2022 verið hetta:

1. Íverksetarahúsið	kr. 1.400.000,00
2. Gamli Klubbin tekjan	kr. 700.000,00
3. Býráðshúsið tekjan/úthang	kr. 1.000.000,00

Metingar/tilboð, sum eru komin inn upp á neyðugar/átrokandi verkætlanir, eru hægri enn avsetingin á 2 mió.kr.

Ætlanin er eisini at selja Gomlu Politistøðina, Jústabrekka 1.

Sostatt eru avbjóðingar við avsetingini til *Fastognir* í 2022. Hóast hetta, so verður mett neyðugt, at fyrisitingin fær eina heimild til at seta ávíst arbeiði í gongd. Hugsað verður her um Íverksetarahúsið, har eitt drúgt fyrireikingararbeiði er framt, sum fer at kosta 1,4 mió. kr. íroknað kommununnar part av mvg. Arbeiðið er í gongd, sum umfatar innanduraarbeiði í samband við rýmingarleiðir og hitainstallasjón. Ætlanin er harumframt at seta nýggj vindeygu í og at dagføra útsíður. Vindeyguni eru keypt til húsið í 2021.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar/viðmerkingar:
Sambært fíggjarætlanini 2022 er játtanin til *fastognir íløgur* -3,5 mió. kr. Settar eru 2 mió. kr. av til íløgur bygningar og 5,5 mió. kr. ísbv sølu av Gomlu Politistøðini. Netto gevur hetta kommununi eina inntøku upp á 3,5 mió. kr.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð. Fyrisitingin ynskir við hesum at varsla um, at verkætlan nr. 1 (Íverksetarahúsið) er í gongd og verður fíggjað av *Fastognir Íløgur*.
Tekniska fyrisiting fer tí við hesum at heita á viðkomandi nevndir og býráð um at viðgerða støðuna serstakt, tí ætlanin var neyvan tann, at peningurin til átrokandi verkætlanir (2,0 mió. kr.) innan konto til *Fastognir* skuldi verða treytaður av neyðugari sølu av bygningum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. mars 2022:
Nevndin tekur undir við raðfestingarlistanum í tilmælinum, dagf. 21-02-2022.

Fíggjarnevndin 22. mars 2022:
Nevndin tekur undir við UBN 14-03-2022.

Klaksvíkar Býráð 24. mars 2022:
Tilmælið frá FíN 22-03-2022 einmælt samtykt.

31/22
21/02151-13 Vegir, Íløgur, 2022 - Regulering av "Garðabrekkuni"

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	14.03.2022	16/22
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.03.2022	42/22
3 Tekniska Nevnd	15.03.2022	17/22
4 Fíggjarnevndin	22.03.2022	19/22
5 Klaksvíkar Býráð	24.03.2022	31/22

21/02151-13 Vegir, Íløgur, 2022 - Regulering av "Garðabrekkuni"

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 28. februar 2022, verður greitt nærri frá málinum.
Í stuttum snýr málið seg um at gera eina regulering av brekkuni norðast á Garðavegnum, "Garðabrekkan" í samband við eina vegaloysn, har Stangavegurin og Garðavegurin koma saman.



Reguleringin hevur við sær, at kommunan má ogna sær ella gera avtalu um lendi til vegaloysnina. Kommunan hevur samskift við avvarðandi lendispartar, og er ein loysn funnin, har kommunan ognar sær matr.nr. 1160 og ger eina avtalu við eigaran av matr.nr. 1202 um eina ál av tí matriklinum.

Ætlandi skal málið loysast innan verandi fíggjarkarm við eini umraðfesting av kontunum *Vegir, Íløgur* og *Byggbúning Bústaðir – vegir til eldri sethúsaøkir* (til keyp av matr.nr. 1160).

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið ætlast loyst innan verandi fíggjarkarm. Sambært uppgerðum og frágreiðing omanfyri kann einans vísast á kontuna til *Vegir Íløgur* har tilsamans 7,0 mió. kr. eru settar av, og til kontuna *Býggibúning Bústaðir – vegir til eldri sethúsaøkir* - har tilsamans 2,5 mió. kr. eru settar av.

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting mælir viðkomandi nevndum og býráði til, at kommunan ognar sær matr.nr. 1160, vísandi til frágreiðingina um málið.

Ferðslunevndin 14. mars 2022:
Nevndin tekur undir við málinum, tí talan er um eina sera góða ferðsluliga loysn.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. mars 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 28-02-2022.

Tekniska Nevnd 15. mars 2022:
Nevndin tekur undir við UBN 14-03-2022.

Fíggjarnevndin 22. mars 2022:
Nevndin tekur undir við TN 15-03-2022.

Klaksvíkar Býráð 24. mars 2022:
Tilmælið frá FíN 22-03-2022 einmælt samtykt.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

32/22
22/00549-2 Jústabrekka 1 – søla av ognini

Fundurin lokin kl. 18:45